

## Stjórnarfundur við Mount Everest

Seinni í mánaðinum fer stjórnin í Nepal at halda fund í einari legu í 5.360 metra hædd á Mount Everest. Endamálið við tiltakinum er at vísa altjóða samfelagnum, at veðurlagsbroytingarnar kunnu fáa sera álvarssamar avleiðingar fyri Nepal. 14 av heimsins hægstu fjøllum eru í Nepal, og granskarar siga, at fleiri túsund jøklar í Himmalaya-fjøllunum kunnu bráðna burtur. Tíggju av teimum stóru áunum í Asia hava sín uppruna í nepalsku fjøllunum, og hvørvur ísurin har, torna keldurnar eisini um eini 50 ár, siga granskararnir.

# ðu feløgini

borið við 850.000 í teirra síðstu meting«, sigur IFS í greining síni.

Mest áhugavert er tó, at hóast greiningarfyritøkan metir Atlantic Petroleum at fáa eitt hall í ár á 35 milliónir krónur, so væntar IFS, at felagið fær eitt avlop í næsta ár eftir skatt á 32 milliónir krónur.

Skoytt verður upp í, at greiningin er gjørd áðrenn Atlantic Petroleum kunngjørdi, at øll partabrøvini í útboði eru seld við kapitalhækkanina. Hetta gevur felagnum 188 milliónir krónur meiri í partapeningi, og tað broytir sjálvandi arbeiðsfortreytirnar hjá Atlantic Petroleum.

### Varðveitir ratingina

Tá talan er um Føroya Banka sigur IFS, at kjarnan hjá bankanum eru inntøkurnar frá av vanliga bankavirkseminum.

»IFS metir at netto rentuinntøkurnar verða góðar 102 milliónir krónur í 3. ársfjórðingi 2009 og er hetta væl meira (18,4%) enn fyri sama ársfjórðing 2008«, sigur greiningarfyritøkan.

Somuleiðis verður mett, at rentumarginalurin hjá Føroya Banka er 5,5% fyri alt 2009. Avsetingarnar verða mettar til 90 milliónir krónur fyri 2009, og tað er áleið tað sama sum í 2008.

»Av hesum metir IFS at 17 milliónir krónur eru fyri 3. ársfjórðing.

IFS metir, at úrslitið hjá Føroya Banka fyri 3. ársfjórðing verður góðar 35 milliónir krónur eftir skatt.

Fyri alt 2009 metir IFS eitt úrslit á 134 milliónir krónur«, sigur greiningarfyritøkan.

IFS vísur á, at Moody's hevur staðfest somu kredit-rating til Føroya Banka, har Moody's fyri fleiri danskar bankar hevur lækkað kreditratingina.

»Føroya Banki hevur gjørt íløgur í tryggingarfelag í Íslandi. Men væntandi kemur tað ikki at síggjast aftur í roknskapinum fyrr enn næsta ár. Eftir at Føroya Banki hevur fingið lán úr bankapakka 2 er solvensurin komin upp á 25,2%. IFS metir, at tað er óneyðugt at hava ein so høgan solvens, men heldur orsøkina til at Føroya Banki ynskir hetta er, at møguleikarnar at bjóða uppá danskan banka gerast væl betri«, sigur IFS í sínari greining av Føroya Banka.

### Eik stríðist

Fjórða listaða føroyska fyritøkan er Eik Banki, sum longu hevur kunngjørt sín roknskap fyri triðja ársfjórðing 2009.

IFS metti, at bankin fór at kunngera eitt hall á knappar 20 milliónir eftir skatt, men roknskapurin vísti eitt nakað størri hall, góðar 30 milliónir.

Hetta hevur eisini fingið Eik Banka at niðurjustera metingarnar fyri 2009 soleiðis, at samlaða úrslitið fyri árið verður eitt hall á 150 milliónir krónur.

Bankin sigur, at tað eru serliga ótryggu viðurskiftini á danska fastognar marknaðinum, sum eru orsøkin til framhaldandi hallið í roknskapinum. Hinvegin fegnast bankin um, at inntøkurnar av rentum og avgjøldum nú aftur er komið á sama støði, sum fyri einum ári síðani.

Roknskalpurin hjá Eik Banka vísir eitt hall fyri fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar á knappar 100 milliónir krónur, og tað er fyrst og fremst altjóða fíggjarkreppan, ið er høvuðsorsøkin við teimum avleiðingum, hetta hevur havt fyri serliga dóttirbankan í Danmark.

Hinvegin hevur Eik Bank Danmark og Eik Banki í Føroyum upptikið lán úr Bankapakka II, og hetta hevur styrkt um støðuna hjá bankanum. Hetta hevur kortini eisini merkt avsetingar móti tapi hjá øðrum bankum, har allir lántakarar í Bankapakka II hefta solidariskt.

Eik Banki hevur betri vónir fyri 2010.



*Samráðingar hava verið við tvey tey lægstu tilboðini, men enn er ikki støða tikin til, hvør fær ruskinnsavningina frá nýggjárinum at rokna*

# Trý vilja savna rusk

**Tríggjar fyritøkur hava givið tilboð upp á at savna inn ruskið í Tórshavnar kommunu**

RUSKINNSAVNAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sáttmálin, sum Tórshavnar kommuna hevur við Tom Hellisdal um ruskinnsavnan í kommununi, rennur út á nýggjárinum.

Kommunan hevur tí havt lýsingar í bløðunum, har innsanvanin verður boðin út, og trý tilboð eru komin inn.

- Talan er um eitt tilboð úr Havn og tvey uttanfyri kommununa. Vit hava havt innleiðandi samráðingar við fyritøkurnar fyri tvey tey lægstu tilboðini, og málið verður nú lagt fyri Heilsu- og umhvørvisnevndina, sum síðani ger eitt tilmæli, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Tá málið er avgreitt í Heilsu- og umhvørvisnevndini, verður teirra tilmæli lagt fyri fíggjarnevndina at taka støðu til. Síðani skal málið leggjast fyri býráðið til støðutakan.

Heðin Mortensen váttar, at verandi ruskinnsavnari, Tom Hellisdal, eru millum fyritøkurnar, sum hava latið inn tilboð, men hann vil ikki avdúka, hvør eigur lægsta tilboðið.

- Málið er ikki búgvið til tað enn, men tað er greitt, at býráðið fer at arbeiða skjótt, tí verandi sáttmáli gongur út á nýggjárinum, sigur borgarstjórin.

Hann dugir kortini ikki at siga, um málið verður avgreitt áðrenn verandi sáttmáli gongur út, ella neyðugt verður at leingja verandi sáttmála í eitt stutt tíðarskeið.

Tað hevur ljóðað, at eitt tilboð úr Kvívík var lægst, men tað hevur borgarstjórin onga viðmerking til.

- Nú fíggjarlógin fyri komandi ár er fyri, er neyðugt at halda býráðsfundir títtari enn vanligt. Ein verður nú hósdagin og ein aftur í komandi viku. Væntandi kemur málið um ruskinnsavnan fyri á býráðsfundinum í komandi viku, sigur Heðin Mortensen.

# Nýggj andlit í býráðnum

**Bæði Elin Lindenskov og Vagnur Johannesen eru í løtuni í farloyvi, og tí koma eykalimirnir inn í býráðið í Havn**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú fíggjarlógin fyri komandi ár er til viðgerðar, er fundarvirksemið dúgligt í Tórshavnar býráð. Fundur verður nú hósdagin, og ein nýggjur fundur verður longu aftur í komandi viku.

Nú hósdagin verða mál fyri sum eitt nú vindmyllur, moldgoymslan í Kollfjarðadali nærhendis Royndarstøðini, sum skal »avviklast«.

- Eisini kemur spurningurin um 10. flokk í skúlunum í Havn fyri eftir ynski frá einum av býráðslimunum. Sølutorgið í Vágsbotni skal eisini til viðgerðar, og so eisini útstykkingin í Nólsoy, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann upplýsir annars, at bæði Elin Lindenskov úr Javnaðarflokkinum og Vagnur Johannesen úr Fólkaflokkinum eru í farloyvi, og í teirra stað møta ávikavist Rúni M. Djurhuus og Inga Dahl. Seinni nevnda hevur áður verið valdur býráðslimur, meðan Rúni M. Djurhuus tekur sæti í býráðnum á fyrsta sinni.



*Rúni M. Djurhuus tekur sæti í býráðnum á fyrsta sinni*